UTTAN ÚR HEIMI

## Sleppur ikki so

Hóast amerikanska stjórnin sigur seg fegnast um, at Libya hevur gjørt av at sleppa sær av við síni hópoyðingarvápn, hevur George W. Bush, forseti, ongan hug at lata stýrið hjá Muammar Gaddafi sleppa so.

Tvørturímóti hevur Bush gjørt av, at amerikonsku handilstiltøkini ímóti Libya verða verandi í gildi. Tey vórðu sett í verk í 1986. ST setti eisini tiltøk í verk ímóti Libya, men tey fóru úr gildi í september í fjør, tá Libya játtaði at rinda 2,7 milliardir dollarar í endurgjaldið fyri tilburðin, tá eitt amerikanskt ferðamannaflogfar varð sprongt yvir skotska býnum Losckerbie í desember í 1988.

Libya hevur tengt hesa játtanina at einari amerikanskari tilsøgn um at sleppa handilstiltøkunum ímóti landinum. Libyski forsætisráðharrin hevur sagt, at verða amerikonsku tiltøkini ikki sett úr gildi innan 12. mai, fer Libya bara at rinda 40 prosent av endurgjaldinum.

## Leita nú eftir øðrum

Síðani avgjøldini á rúsdrekka fullu í Danmark herfyri, hava teir donsku tollararnir funnið meiri rúsevni enn frammanundan.

Tollararnir siga, at teir fingu minni at gera, tá rúsdrekkaprísurin fall í Danmark, tí nú var tað ikki so lønandi longur at fara til Týsklands at keypa rúsdrekka. Tað gjørdi, at teir fingu betri stundir til at leita eftir øðrum, sum fólk høvdu við sær um markið, og tað hevur givið úrslit. Í fjør funnu tollararnir 121 kilo av rúsevnum, og tað var fýra ferðir meiri enn í 2002. Tá er hasjið ikki við, men eisini her gjørdu donsku tollararnir kvetti í fjør. Teir funnu ikki minni enn trý tons av hasji, og tað var næstan tjúgu ferðir meiri enn í 2002.

Men tað góða úrslitið sigur eisini tollverkinum, at nógv verður smuglað um markið til Danmarkar, og tí er avgjørt at leggja uppaftur størri dent á at avdúka tey, sum smugla rúsevni um markið.

## Spælir við vøddunum

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, spældi enn einaferð við vøddunum mánadagin, tá hann endurtók hóttanina um at byrgja palestinararnar inni í teirra egnu økjum.

Ein tílík avgerð hevði havt við sær, at tær jødisku niðursetubygdirnar í teimum palestinsku økjunum mugu takast niður, og tað hóvar als ikki høgravonginum í ísraelskum politikki. Heldur ikki í Likud-flokkinum hjá Sharon eru menn líka fegnir um hugsjónina hjá forsætisráðharranum, og sambært blaðnum Haaretz umhugsar floksleiðslan at krevja, at hon skal góðkenna allar hugsjónir forsætisráðharrans, áðrenn hann almannakunnger tær.

Teir høgrasinnaðu flokkarnir, sum mynda samgonguna saman við Likud, vilja ikki hoyra talan um at taka niðursetubygdirnar niður. Niðursetumenninir hava hótt við borgarakríggi, verður avgerðin hjá Sharon framd í verki.

## Ov mikið av ákærum

Tað fer eftir øllum at døma ikki at standa á at finna ákærur ímóti fyrrverandi irakska forsetanum Saddam Hussein, sum situr fangi hjá amerikanarunum.

Í gjár kunngjørdu myndugleikarnir í Kuwait, at teir hava ikki færri enn 178 ákærur ímóti Saddam Hussein og hansara næstu medarbeiðarum. Talan er um krígsbrotsverk, sum irskska leiðslan verður løgd undir at hava framt, tá Irak hersetti Kuwait í 1990. Talið verður helst størri, tí kuwaitiski uttanríkisráðharrin sigur við AFP, at ákærurnar helst verða einar 200 í tali, tá alt er gjørt upp.

Irak hersetti Kuwait í sjey mánaðir í 1990 og 1991. Kuwaitar vilja vera við, at iraksku hermenninir framdu fleiri krígsbrotsverk í hersetingartíðini, og at minst 1.000 sivilir kuwaitar lógu eftirá. Harafturat vórðu fleiri ósek fólk tikin, summi vórðu pínd, og irakar løgdu eisini hald á kuwaitiska ogn.

# Bush skal verjast ímóti mótmælum

*George W. Bush, forseti, skal verjast ímóti mótmælisfólki og mótmælandi herrópum hetta til forsetavalið í november*



**Ongar mótmælisgongur. Eingi mótmæli. Ongar plakatir ella herróp. Soleiðis verður sjónvarpsmyndin av George W. Bush, forseta undir valstríðnum í ár.**

VALSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er Secret Service, sum skal tryggja, at einki mótmælisfólk ella nøkur mótmælandi plakat verður nærri enn ein kilometur frá forsetanum hetta til forsetavalið í heyst.

Sabært blaðnum San Fransisco Cronicle hevur løgreglan tikið fleiri fólk, sum hetta seinasta árið eru komin í so nær forsetanum við mótmælisplakatum. Sambært løgregluni eru fólkini tikin, tí tey kundu koma bæða sær sjálvum og forsetanum í vanda.

Felagsskapurin American Civil Liberties Union hevur stevnt Secret Service fyri at hava brotið tey grundlógartryggjaðu rættindini hjá amerikanarum at siga sína hugsan. Felagsskapurin sigur, at Secret Service og Hvítu Húsini nýta trygdina hjá forsetanum sum skálkaskjól, men at talan í veruleikanum er um politiskar orsøkir, tí tað ræður um at halda teimum niðri, sum hava hug at siga forsetanum ímóti ella at finnast at politikki hansara.

Tí slíkar myndir mugu ikki koma á amerikonsku sjónvarpsskíggjarnar í einum forsetavalári, sigur American Civil Liberties Union.

Hvítu Húsini hava ongar viðmerkingar til ákærurnar hjá felagsskapinum.

# Elizabeth skuldi ongantíð havt arvað trúnuna

**Bretskir søgufrøðingar vilja vera við, at tann rætti arvingurin til ta bretsku trúnuna býr í einari bygd í Avstralia.**

SÍÐULOP
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Elizabeth II hevði var als ikki tann rætti arvingurin, tá hon tók við bretsku trúnuni. Tann rætti var tann nú 62 ára gamli Michael Hastings, sum býr í bygdini Jerilderie í New South Wales í Avstralia.

Tað sigur bretski søgufrøðingurin Michael Jones í einari nýggjari sjónvarpssending. Søgufrøðingurin vísir á, at ein av forfedrunum hjá drotningini, Edward kongur Fimti, var úrslit av einum síðulopi hjá mammuni og tí als ikki borin til trúnuna, tá hann tók við í 1461. Tann rætti arvingurin var harafturímóti hertogin av Clarence, sum var ein av forfedrunum hjá avstralska Michael Hastings, sigur Michael Jones.

Sjálvur ætlar avstraliumaðurin ikki at krevja trúnuna frá Elizabeth drotning.

– Drotningin fer ikki at fáa bræv frá mær um, at hon skal fara út av Buckingham Palace við sínum innan tríggjar vikur, ella at hon skyldar mær húsaleigu fyri 500 ár, sigur Michael Hastings við tíðindastovuna AFP.





*– Vit hava fingið sera nógvan respons uttanlands, frá festivalum, miðlum, søluumboðum og øðrum, sigur Birgir Sigurðsson, sangari í I AM*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# I AM móttiknir við opnum ørmum

**Teir eru hvørki bygdaligir ella yt. Gospelbólkurin I AM hevur fingið vind í seglini sum ongantíð áður. Nú seta teir kós út í heim, og í summar skulu teir spæla uttanlands. Nýggja fløgan hjá teimum skal eisini seljast í Norðurlondum**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

I AM eru – nakað fyri seg. Bólkurin blandar kristiligan boðskap og rocktónleik í eitt tónleikabland, ið hevur givið teimum undirtøku, sum neyvan nakar føroyskur gospelbólkur av hesum slagi áður hevur havt.

Teir hava verið virknir í fleiri ár og hava verið væl umtóktir, men summi hava havt hug at kalla tónleikin hjá teimum bygdaligan.

Men soleiðis er ikki longur.

Við nýggju útgávuni áðrenn jól staðfesti bólkurin, at teir eru nógv broyttir, tónleikurin er vorðin modernaður, og sangirnir, sum altíð hava verið styrkin hjá bólkinum, standa framvegis mát – eisini í nýggja búnanum, har løgin ljómborðsljóð og hoppandi teldutrummum verða rend saman við vanligu ljóðførini.

Og undirtøkan, sølan og levnaðurin til framførslurnar hjá teimum vísa, at teirra dagførdi gospelrockur er móttikin við opnum ørmum allastaðni.

### Ovfarnir av móttøkuni

Longu fyrstu vikuna, eftir at fløgan Xthree.one.four var komin út, varð greitt, at her var talan um fløgu, sum fór at selja væl.

– Vit vóru fullkomiliga tiknir á bóli av tí frálíku móttøkuni. Vit hildu kortini sera tætt at kroppinum, og nærum eingin slapp at hoyra nakað av fløguni, áðrenn hon kom út, so vit vóru sera spentir hvat áhoyrarar fóru at halda um fløguna. Tey nærmastu siga altíð at tað ljóðar væl, men tá miðlar, tónleikarar, ummælarar og fólk yvirhøvur fegnast um úrslitið, tá gleðir tað sjálvandi okkum sera nógv, sigur Birgir Sigurðsson, sangari í bólkinum.

– Tað er trupult at siga, hví fløgan hevur fingið slíka móttøku. Hetta er er ikki júst fólksligur tónleikur sum til dømis Frændur ella Magni Christiansen, men tað er ymiskt, sum kann hava hjálpt til við áhuganum. Millum annað koma fáar rockfløgur út í Føroyum, so um man gevur eina slíka fløgu út til røttu tíðina, kann man rættiliga fáa vind í seglini.

– Saman við góðari marknaðarføring og sera nógvari orku frá okkum øllum í bólkinum, hevur alt gingið upp á stás. Kanska er fløgan eisini bara góð.

### Spælt allastaðni

I AM hevur gjørt nógv fyri at føra seg og tónleikin hjá sær fram. Teir hava spælt til óteljandi tiltøk seinastu vikurnar, og teir hava verið við til evarska smá og risastór tiltøk. Einki hevur ligið á láni.

– Tað er strævið at skula spæla so nógv, men tað hevur eisini verið stuttligt og minniligt. Vit byrjaðu longu í september mánaði at gera promotion fyri fløguna, og síðani hava vit spælt til eina rúgvu av tiltøkum. Tá man sum kristin rockbólkur vanliga spælir fyri fullan útblástur, er tað altíð áhugavert og annaðleiðis at royna onnur tiltøk enn tær vanligu høll-konsertirnar, sigur Birgir Sigurðsson.

– Allar framførslur hava sína sjarmu og geva okkum nakað, men hesaferð vóru tað serliga útgávukonsertin hjá okkum á Eiði og Nýggjárskonsertin í Havnini, ið standa eftir.

– Á Eiði vóru vit so hepnir at sleppa at hava fyrstu konsert yvirhøvur í teirra nýggju ítróttarhøll, so tað vóru vit sera glaðir fyri. Bygdarráðsformaðurin kom og klipti tráð og helt røðu, tað høvdu vit ikki upplivað fyrr.

– Vit høvdu ikki roynt at spæla til Nýggjárskonsertina áður, so vit vóru eitt sindur í iva um, hvat vit skuldu vænta. Fóru hesu ungu havnafólkini halda okkum vera yt ella bygdasligar. Vit funnu skjótt útav, at fólk dámdu okkum sera væl og vóru við frá okkara fyrsta tóna. Tey sungu við av lív og sál og klappaðu okkum enntá uppaftur. Tað er altíð stuttligt at hoyra 1.300 fólk duga tínar sangir uttanat, sigur Birgir Sigurðsson.

### Seta kós út í heim

Nú hevur I AM mest sum tráðroynt á føroysku grunnunum, og teir hava sett kós út í heim til nýggjar fiskileiðir.

– Okkara ætlanir eru nú at koma víðari út í heim. Vit hava eina nýggja fløgu í viðførinum, og hon kann nýtast til at marknaðarføra okkum uttanlands eisini, sigur Birgir Sigurðsson.

– Vit hava fingið sera nógvan respons uttanlands, frá festivalum, miðlum, søluumboðum og øðrum. Vit hava verið uttanlands áður og spælt, so vit hava fleiri kontaktir uttanlands at senda tilfar til. Umframt tað hava vit seinastu mánaðirnar havt samband við fleiri søluumboð í Norðurlondum og verður xthree.one.four útgivin uttanlands um nakrar mánaðar. Hetta verður nokk meira at frætta um heilt skjótt.

– I AM fara heilt vist at spæla uttanlands í summar. Vit vunnu Gospel Prix 2003, og har var vinningurin at koma uttanlands at spæla á einum stórum festivali. Vit hava eisini havt samband við fleiri aðrar festivalar, sigur Birgir Sigurðsson, sum tó vil bíða eitt sindur við at vera meira ítøkiligur um útlendska áhugan.

Men við einum tryggum føroyskum palli sum grundarlagi, ætlar bólkurin at royna flogið uttanfyri landoddarnar.

Og so fæst at síggja, um I AM eisini har eru – nakað fyri seg.